


# Ferðin byrjar umborð á Norrönu



Tað hevur týdning fyri Smyril Line, at kundin verður settur í hásætið, og at fólk veruliga merkja at ferðin byrjar, tá ið Norrøna leggur frá landi.

Í 2009 hevur Smyril Line valt at gera meira burturúr at lýsa teir møguleikar, sum eru umborð á Norrønu, tá ið føroyingar ferðast til onnur lond í egnum bili.

Fyri at gera umstøðurnar umborð á Norrønu so góðar sum møguligt, hevur Norröna fingið nýggjar góðar stabilisatorar og tráðleyst internet til ferðafólkini. Harumframt er taxfree handilin útbygdur, partar av matstovunum eru umbygdir. Teir nýggjastu filmarnir vera vístir í biografinum, og undirhald er til børn og vaksin o.s.fr.

**Danmark tvær ferðir um vikuna um summarið**
Í sambandi við nýggju ferðaætlanina hjá Smyril Line siglir Norröna tvær ferðir um vikuna ímillum Føroyar og Danmark í summar. Hetta ger, at føroyingar sum skulu ferðast til Danmarkar og Europa í egnum bili hava nógv betur møguleikar ferðast, tá ið tað liggur best fyri hjá teimum.

Siglingarætlanin er einfaldari enn áður, og prísirnir eru júst teir sum lýst verður við. Vit á Smyril Line hava roynt at gjørt tað so ómakaleyst sum møguligt at bíleggja frá Smyril Line, ella einari av ferðaskrivstovunum; 62N, Fonn Flog og Faroe Travel selja nevnliga eisini ferðaseðlar við Norrønu.

Smyril Line hevur hópin av tilboðum í serliga Danmark, men eisini í Norðurtýsklandi og Svøríki. Smyril Line hevur serliga lagt seg eftir at selja familjuvinarligar frítíðardeplar. Frítíðardeplar so sum Danland, Danparcs og Lalandia. Harumframt hevur Smyril Line merkt ein vaksandi áhuga ímillum føroyingar at leiga sær eitt summarhús, m.a. gjøgnum Dansommer.

Tað er upplagt at njóta frælsið, ið ein fær við at ferðast í egnum bili – og njóta at sleppa undan at draga viðføri, barnavogn og lutir aftur og fram úr Føroyum. Tað er bara at pakka bilin í túninum, koyra umborð á Norrönu – hugna sær umborð, og taka viðføri og aðrar lutir úr bilinum, tá ið tit eru komin til frítíðardepilin ella summarhúsið.

Vegna Smyril Line vil eg gjarna enda við at siga, at vit gleða okkum til at síggja nógvar føroyingar umborð á Norrönu í summar - vælkomin umborð á Norrönu!

*Jákup Sverri Kass,*
*sølu- & marknaðarstjóri*

## Summarfrí í Danmark

**Blaðið »Summarfrí í Danmark« er gjørt til føroyingar, sum ætlar sær til Danmarkar at ferðast í summarfrí – og er gjørt í samstarvi við Smyril Line. Blaðið verður borið út saman við Sosialinum og verður eisini at fáa á skrivstovuni hjá Smyril Line og umborð á Norrønu.**